# Kyndil kærir dómarar

**Eftir tapið fyri Stjørnuni hevur Kyndil sent kæru inn, har liðið krevur nýggjan dyst. Skeivar dómaraavgerðir avgjørdu dystin, verður sagt**

KÆRUR
*Jákup Mørk*

Hóast bert eitt umfar er leikt av hondbóltslandskappingini í vetur, so hevur kappingarnevndin hjá HSF longu fingið sína fyrstu kæru at taka støðu til.

Kyndilskvinnurnar, sum um vikuskiftið taptu fyri Stjørnuni í Klaksvík, hava nevnliga sent kæru inn, har nýggjur verður kravdur.

## Dómaramistak kostaði

Orsøkin til kæruna er sjálvsagt hendingin stutt fyri leiklok, sum vit umrøddu í týsdagsútgávu okkara.

Í stuttum kann nevnast, at kyndilsvenjarin tá var í øðini um dømingina, sum hansar tykki kostaði teimum dystin. Tað, sum hendi, var, at dómaraborðið í fyrstu atløgu dømdi liðið fyri at fremja eina skeiva útskifting, og í kjalarvørrinum av hesum hendu nøkur dómaramistøk, sum helst komu av, at dómararnir ikki vóru nóg greiðir um, hvussu nýggju reglurnar virka.

## Yvirgangstíð

Sum sagt, so hevur Kyndil kravt nýggjan dyst, men sum skilst á kappingarnevndini, so er tó ivasamt, hvussu verður við hesum.

Tað stendur í øllum førum fast, at nýggjur dystur undir ongum umstøðum kann ásetast, tí ákærin sigur dómaraborðið hava mistikið seg í sínari døming. Har vil talan altíð vera um dómarans meting, og hendan stendur ikki til at vika.

Spurningurin er so, hvørja støðu nevndin kemur til, um talan er um álvarsligt dómaramistak, orsakað av, at nýggju reglurnar við útvísingum júst eru komnar í gildi.

Her er spurningurin, um hondbólturin í eitt ávíst tíðarskeið, t.d. eitt kappingarár, skal fáa loyvi at venja seg við reglurnar, og at tað tí í ávísan mun verður sæð ímillum fingrarnar, tá dómarar fremja mistøk, sum ein avleiðing av nýggju reglunum.

Nær kappingarnevndin fer at taka støðu í málinum, er ikki greitt enn, men væntandi verður hetta innan alt ov langa tíð, og fara vit tá at frætta nærri frá hesum.



*Veruligt rok tók seg upp, tá dómaraborðið í Klaksvík gav Kyndli eina útvísing, og nú hevur Kyndil kært hendingarnar kring hetta og kravt nýggjan dyst*
*Mynd: SjH*




# Laaaannngt vikuskifti í Aberdeen

hósdag til mánadag...ja!




Aberdeen hevur nógv at bjóða tær. Bæði til gaman og álvara. Unna tær eina fríløtu frá gerandisdegnum við einum longum vikuskifti í Aberdeen, har tú tekur tær av løttum. Spáka tær ein túr eftir longu handilsgøtuni Union Street. Vitja tey ymisku søvnini og tað nú so væl umtókta SATROSPHERE, sum er áhugavert fyri bæði børn og vaksin. Stuttleika tær í stuttleikaparkini Cadona´s ella slappa av í the Leisure Centre. Hugna tær við einum góðum bita á einari av teimum mongu fráliku matstovunum. Og gloym ikki at vitja pubbirnar við tí livandi tónleikinum. Ja, Aberdeen hevur sanniliga nógv at bjóða.

Fráferð úr Vágum hósdag kl. 17.30.
Fráferð úr Aberdeen mánadag kl. 09.00
ella kl 19.00.

Ferðaavgjald sum er kr. 474,- kemur afturat prísinum

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo

Bílegg hjá tínari ferðaskrivstovu ella hjá Atlantic Airways

www.atlantic.fo

SANSIR · TEL 355 355


# Luksemburg vil hava Allan Simonsen





*Myndirnar frá tíðindafundin eftir dystin í Luksemburg siga helst alt um støðuna hjá teimum báðum venjarunum, og helst eru tað júst dystirnir móti Føroyum, sum hava vakt áhugan í Luksemburg fyri Allan Simonsen*

**Paul Philip gevst sum landsliðsvenjari komani ár, og nú vil Luksemburg hava føroyska landsliðsvenjaran**

VENJARA-SPURNINGUR
*Jákup Mørk*

Seinastu tíðina hava fleiri gitingar verið, hvørt Allan Simonsen eisini verður føroyskur landsliðsvenjari komandi undankapping, ella um FSF má fara at leita sær eftir nýggjum venjara.

## Mugu bíða

Danska fótbóltsheimasíðan, bold.dk, visti mikukvøldið at siga, at í Luksemburg verður fylgt væl við, hvørjar ætlanir Allan Simonsen hevur fyri framtíðina.

Verandi venjari teirra, Paul Philipp, sum í ár hevur tapt tvær reisur fyri Allani, fer ikki at leingja sín sáttmála við Luksemburg, og fjølmiðlarnir vija vera verið við, at Allan Simonsen stendur ovast á ynskislistanum hjá Luksemburg.

Akkurát, hvussu nógv hald er í hesum tíðindum, er ilt at staðfesta, men at áhugin millum fjølmiðlarnar í minsta beneluxlandinum er stórur, er einki at ivast í. Millum annað settu fjølmiðlar úr Luksemburg seg í samband við Sosialin mikudagin, fyri at vita, um Allan hevði sagt nakað um framtíð sína.

Svarið, sum vit kundu geva teimum, var tó ikki stórt øðrvísi, enn tað, sum Allan Simonsen gav týsku sjónvarpsrásini, RTL, týskvøldið.

- Eg ætli mær at nýta komandi 14 dagarnar til at umhugsa støðu mína, er framvegis einasta viðmerkingin, sum landsliðsvenjarin hevur um framtíð sína.



# Mánadagur 15. oktober

## SVF

18.30 Fres - (e)
19.00 Villa Kat 4:13
19.30 Madison 10:26
19.55 Læknin hevur orðið
20.25 Gesturin
20.55 Okkara matstovur
21.35 North Square 7:10 - ensk virðislønt dramarøð
22.25 Tvíburar 1:3 - dokumentarrøð frá BBC
23.15 The Vice - ensk kriminalrøð
00.00 Liðugt

## Eurosport.com

07:30 Xtreme Sports
08:30 News
08:45 Tennis
10:00 Tennis
11:00 Archery
12:00 Cycling
14:30 Football
15:30 Football
16:45 News
17:00 Football
18:30 All Sports
19:00 Motorcycling
21:00 Football
22:30 News
22:45 Nascar
23:45 All Sports
00:15 News
00:30 Close

## BBC Prime

0.00 TLZ: »Ancient Voices: Blood and Flowers – In Search of the Aztecs«
1.00 TLZ: »In the Blood – End of the Evolution«
2.00 TLZ: »Romans In Britain: Coming of Age«
2.30 TLZ: »Containing the Pacific«
3.00 TLZ: »What's Right for Children«
3.30 TLZ: »Alaska the Last Frontier«
3.55 TLZ: »Mind Bites«
4.00 TLZ: »Inside Dot Coms – Tales of the Electronic Goldrush«
4.40 TLZ: »Watch – Art – Places«
5.00 TLZ: »Spanish Fix – Wine Tasting«
5.30 TLZ: »Look Ahead«
5.45 TLZ: »Look Ahead«
6.00 Toucan Tecs: »Barmy Barn Dance«
6.10 Playdays: »The Playground Stop«
6.30 Blue Peter
6.55 Kitchen Invaders
7.25 The Antiques Show
7.55 Real Rooms
8.25 Going for a Song
8.55 Style Challenge: »Women DJs«
9.25 The Life of Birds: »Finding Partners«
10.15 The Weakest Link
11.00 TLZ: »Meet the Ancestors«
11.50 TLZ: »Horizon – The Man who lost his Body«
12.40 Bergerac: »Burnt«
13.35 Kitchen Invaders
14.05 Style Challenge: »Oliver Skeete«
14.35 Toucan Tecs: »Barmy Barn Dance«
14.45 Playdays: »The Playground Stop«
15.05 Blue Peter
15.25 Top of the Pops
15.55 Big Cat Diary
16.25 Animal Hospital
16.55 Ballykissangel: »For One Night Only
17.45 The Weakest Link
18.30 Cardiac Arrest: »The Glass Ceiling
19.00 Eastenders
19.30 Fawlty Towers: »A Touch of Class«
20.00 Sunburn
21.00 Very Important Pennis
21.30 Parkinson: »Tracey Ullman, Denice Lewis, Dolly Parton«
22.30 Guns and Roses
23.00 Dangerfield: »Harvest Time«

## BBC World

0:00 BBC News
0:30 Correspondent (r)
1:00 BBC News
1:30 Top Gear (r)
2:00 BBC News
2:30 Dateline London (r)
3:00 BBC News
3:30 Asia Today (r)
3:45 Reporters (r)
4:00 BBC News
4:30 HARDtalk
5:00 BBC News
5:30 World Business Report
6:00 BBC News
6:30 World Business Report
7:00 BBC News
7:30 World Business Report
7:45 Sport Today
8:00 BBC News
8:30 Euro Brief
9:00 BBC News
9:30 HARDtalk (r)
10:00 BBC News
10:30 Top Gear (r)
11:00 BBC News
11:30 Correspondent (r)
12:00 BBC News
12:30 HARDtalk (r)
13:00 BBC News
13:30 World Business Report
13:45 Sport Today
14:00 BBC News
14:30 Clarkson's Car Years (r)
15:00 BBC News
15:30 Correspondent (r)
16:00 BBC News
16:30 Asia Today
17:00 BBC News
17:15 World Business Report
17:30 Click Online (r)
18:00 BBC News
18:30 World Business Report
18:45 Sport Today
19:00 BBC News
19:30 HARDtalk (r)
20:00 BBC News
20:30 Holiday
21:00 BBC News
21:30 World Business Report
22:00 BBC News
22:30 The Money Programme
23:00 BBC News
23:30 World Business Report (r)
23:45 Asia Today

## 3

05:00 Børne-hjørnet med Disney
07:05 Efterårsbio: Alice i Eventyrland
08:25 Ricki Lake(G)
09:15 Ricki Lake
10:10 Horton-sagaen(G)
11:00 Horton-sagaen
11:50 Blossom(G)
12:20 Panter-tanter
12:50 Vild med dig
13:15 Pæn pige - sej sild
13:45 Baywatch Hawaii(G)
14:40 Blossom
15:10 Min kære familie
15:40 Baywatch Hawaii
16:35 Ricki Lake
17:30 Alle tiders barnepige
18:00 Time of Your Life
19:00 Robinson Ekspeditionen 2001
20:45 Mandagsbio: Apollo 13
23:20 TV Razzia
23:55 Vore værste år
00:25 Simpsons
00:55 Ricki Lake(G)
01:50 Drøm videre
02:20 Vore værste år (G)
02:50 Simpsons (G)
03:20 Sunset Beach
04:05 Godnat

## ÚF

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur
Heri Joensen, prestur, lesur
07.15 Barnaløtan
Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
07.30 Tíðindi
07.35 Morgunrásin
Kári Olsen og Dia Midjord leggja til rættis.
08.00 Tíðindi
08.03 Morgunrásin
09.00 Tíðindi
09.03 Sunnudagsløtan (e)
Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis.
09.30 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e)
Heri Joensen, prestur, lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 2
10.10 Tit skriva, vit spæla
Øssur Egholm leggur til rættis.
11.00 Tíðindi
11.03 Løg mær dámar (e)
1. sending hjá Rúna Abrahamsen
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Yvirgangur fyrr og nú (e)
Frásøgumynd, sum Árni Joensen skrivar.
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt
Magnus Johannesen velur løgini
16.00 Tíðindi
16.03 15 tær bestu (e)
Heðin Arge stílar fyri
17.00 Tíðindi
17.05 Hvat nú?
Elis Poulsen leggur til rættis
18.00 Barnaløtan (e)
Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Stýrivolt
Ein mentunarlig brúkarasending. Birgir Kruse leggur til rættis
19.30 Rák
Tónleikasending hjá Kim Hansen
20.00 Løg mær dámar
2. sending hjá Rúna Abrahamsen
20.30 Stuttsøga
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur
Øssur Egholm leggur til rættis
22.00 Estudio 2000
Tónleikasending hjá Kára Annand Berg
23.00 Tíðindi

## Rás 2

09:45 Orðið
Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10:00 Tónleikur
12:00 Tíðindi og kunngerðir
12:15 Tónleikur
13:00 Ynskiløtan
Heilsur frá lurtarum
Sunneva Petersen er vertur
Send heilsanir um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990.
14:00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan (framhald)
15:00 Tíðindi og kunngerðir
15:15 Leysaløtan
Innsløg, prát og tónleikur
Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
16:00 Birgir Beinleiðis
Endursending frá hósdegnum
Birgir Sondum við gesti
17:00 Tónleikur
18:00 Tíðindi og kunngerðir
18:15 Tónleikur
19:00 Orð á Leiðini (EvR)
Endursending frá hósdegnum.
Andaligur búnaðskapur: "Hvussu lesi eg Bíbliuna?" (1. partur av 2)
Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19:40 Tónleikur
21:00 Tíðindi og kunngerðir
21:15 Orðið
Endursending frá í morgun
Bíbliulestur v/Anju Hansen
21:30 Halleluja
Andalig tónleikasending v/Heina Lutzen og Jóannes Poulsen
22:30 Tónleikur
23:00 Liðugt

## Lindin

13.00 Byrjan – Dagsskrá
13.15 Okkara dagliga breyð
14.00 Tónleikur
14.30 "Jesus og eg" v/ Stellu Zachariassen
15.00 Bønarlinjan frá hósdagin 11. oktober verður endursend
17.00 Bønartænastan byrjar. Tlf. 321377, tilber at senda fax nr. 321379
Vit spæla lovsong tann næsta tíman.
17.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
18.00 Bønartænastan.
Biði verður fyri bønarevnunum
19.00 Brót og bitar v/ Eivinn og Rikka Bringsberg
19.10 "Jesus og eg" v/ Stellu Zachariassen (e)
20.30 Okkara dagliga breyð
20.40 Tónleikur
21.00 "Vón fyri teg" v/ Sólbjørg Zachariassen
22.55 Dagslok
Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
23.00 Vit gevast

# Hvat Nú?

*- Sendingin við norðurlendskum dansitónleiki*




Í flestu av hinum norðanlondunum eru líknandi sendingar sum sendingin Hvat Nú, ið er dagsskrá hjá Útvarpi Føroya hvønn mánadag kl. 17.00.

Í sendingini Hvat Nú hesaferð, veður prátað við Erik Forfod ið hevur norska dansitoppin, og sendingina På Dansefot, ið er dagsskrá hjá NRK 1, hvørt leygarkvøld kl. 21-23.

Erik Forfod ið er kendur útvarpsmaður í Noregi greiðir frá dansitónleikinum í Noregi, og sendingini hann ger í norska útvarpinum.

# Gesturin

SVF Mánakvøldið kl. 20.25

Jákup í Stórustovu. Hann segði eitt trygt og fjálgt starv sum sparikassamaður frá sær og hevur síðani havt sum livibreyð at selja føroyskar fótbólstspælarar av landinum. "Talan er bæði um eitt spennandi og krevjandi starv, har stundir ikki eru til at liggja á latu síðuni", sigur hann sjálvur um starv sítt. Higartil hevur hann selt átta spælarar av landinum umframt at hava verið millumgongumaður hjá 10 øðrum, ið hava verið uttanlands og royndarvant hjá kendum fótbóltsfeløgum. "Aðalmálið er at gera umheimin varugan við føroyskan fótbólt og evnaríku fótbóltsspælarar okkara og á henda hátt vera við til at menna fótbóltsmentanina her á landi", sigur fyrsti og higartil einasti leikaraumboðsmaðurin í Føroyum.

*Lagt til rættis: Leivur Hansen.*

# Okkara matstovur




Í 9 sendingum fara vit at vitja okkara matstovur. Mánakvøldið er Guðmundur Guðmundsson á Hotel Norð á Viðareiði, har kokkurin borðreiðir við forrætti úr toskaflaki, høsnalivrapaté og lambakjøtsrætti.